# Missvísandi yvirskrift, Bill

SUNLEIF
RASMUSSEN



Yvirskriftin "Misskilt Musikkmótmæli" gjørdi, at undirritaði byrjaði at lesa lesararbrævið hjá Bill Justinussen við alt annað en góðum vónum. Men so skuldi ikki verða. Eg sá einki í brævinum, ið bar brá av yvirskriftini. Heldur tvørtur ímóti.

Bill harmast um, at løgtingslimir ikki høvdu stundir at lurta eftir, hvat musikklærarar høvdu at siga. Hetta var ikki ætlað sum ein mótmælisgonga. Musikklærarar vildu bert ynskja løgtingslimum góða summarfrítíð við vón um, at lógarsmiðir landsins fara at geva trupulleikanum gætur, ið embætisfólk í Mentamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum hava komið musikklærarum í.

Tað er nevniliga so, at teir musikklærarar, ið undirvísa á einum skúla, arbeiða 40 tímar um vikuna, meðan lærarar, ið undirvísa á fleiri skúlum, kunnu t. d. arbeiða 46 tímar um vikuna fyri somu løn. Hetta halda vit er serstakliga órættvíst og eigur ikki at koma fyri í einum framkomnum samfelag í 2007.

Við at blása ein góðan henda seinasta arbeiðsdag løgtingsins vildu vit eisini geva til kennar, at tað kanska gerst neyðugt hjá løgtinginum at leggja uppí og loysa málið.

Týsdagin 12. juni verða undirskriftir handaðar løgmanni. Undirskriftir, ið foreldur at næmingum á musikkskúlum úti um landið, hava samlað saman. Hetta eru foreldur/veljarar, ið eru sera missnøgd við støðuna, ið musikklærarar á smærru plássunum eru komnir í. Her skal leggjast afturat, at smærri pláss í musikkskúlahøpi, eru stór støð sum Fuglafjørður og Runavík.

Undirritaði kann ikki annað enn vera samdur í, at verðandi landsstýrið hevur ikki havt hepna hond, tá ið um musikkskúlan ræður. Haldi tó, at løgtingslimir samgonginnar hava sýnt positivan hugburð við t. d. at atkvøða fyri eykajáttanini, ið Tjóðveldisflokkurin legði fyri tingið fyrr í ár. Eitt samt løgting stemmaði fyri uppskotinum.

Vónandi verður ikki brúk fyri at marsjera meira rundan um løgtingshúsið, men um málið ikki er loyst áðrenn skúlaársbyrjan gerst helst neyðugt at blása enn ein marsj.

Vónandi fara fleiri løgtingslimir alment at stuðla musikklærarum í sjálvsøgdu rættindum okkara at fáa endurgjald fyri tíðina vit brúka at undirvísa á fleiri skúlum.

Við tónlistakvøðu.

# Bloggan

JOHN
BERG
bygdasligur bygdarmaður við stórum B

Í Blogguni í Dimmalætting nr.102 hevur Gunn Weihe Reinert forvitnisliga grein, ið nevnist "Alt ger muuuuun."

Lesi annars altíð við størsta áhuga "bloggurnar" hjá hasum fittu ungu damunum.

Gunn kemur í hesi "blogguni" inn á tað at selja "ósunnan" mat í "sunnum" pakningi og nevnir so - eftir hennara hugsan - hasar sjúkligu litirnar á mjólkapakkunum.

Citat: Eg veit ikki, eg skal bara hava mjólk. Havi ikki ordiliga brúk fyri forpoppaðum diggedari. Typiskt føroyskt. Alt skal broytast, og eingin veit hví og sera sjáldan hvussu. **Bygdasligt.** Citat endað.

Nú veit eg av góðum grundum ikki, hvat fitiinnihald er best fyri børn, men um eg vildi havt tey at drukkið eitt ávíst slag av mjólk, so hevði eg við "psygologiskum" snildi koyrt ta mjólkina í tann pinkfarvaða pakkan – helst bygdasligt!!!

Well, nú til tað, eg vildi siga.

Vísandi til omanfyrinevnda citat, so er hetta at broyta litirnar á mjólkarpakkunum bygdasligt sambart Gunn.

Nú eri eg heilt úti at koyra, tí eg havi altíð hildið, at tey í teimum "stóru" býunum ofta halda, at tey úti á bygdunum eru bygdaslig og konservativ og vilja ongar broytingar, hugsa bara um tøð og mold, so her eru Gunn og eg ikki heilt samd, skilji eg – veit annars ikki, hvar daman býr.

Hetta orðið "bygdasligt" er ofta at hoyra og síggja í fjølmiðlunum.

Hevði verið áhugavert, um Gunn í næstu "Bloggu" hevði kunna "bloggað" okkum sína tulking av orðinum "bygdasligt."

Gleiði meg annars til fleiri "bloggur"

# Gysarin á Eystaru vág

ODDVØR
JOHANSEN
Tórshavn



Formansskapur Føroya Løgtings (Edmund Joensen, Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannesen, Óli Breckmann) er komin við einum fantastiskum uppskoti, beint sum tingið er farið í summarfrí. Teir ynskja sær – einaferð enn – eitt nýtt tinghús og hava gjørt tað í meira enn eitt ár. Tí hava teir heitt á Palla Gregoriussen, arkitekt, um at hjálpa sær við eini skitsu til uppskotið.

Tað er hesa skitsu í Sosialinum 4. juni og í Dimmalætting 5. juni 2007, vit mugu halda okkum til.

Á sjálvari Kongabrúnni síggja vit ein risa í neystalíki, ein tungan klump, (orsaka Palli) verða settan oman á tað, sum kann hugsast at vera eitt parkeringsøki undir jørð. Fyri at stytta um longu leiðina út í Tinganes, verður ein brúgv gjørd tvørtur um vágna.

Løgtingsformaðurin kunnger, at á henda hátt verður tingið flutt á tann upprunaliga tingstaðin – ein løgin útsøgn, sum bara kann stava frá, at menn ikki eru staðkendir.

Eftir mínum tykki verður Eystaravág við hesum uppskoti kvald. "Tinghúsið" passar als ikki saman við tí, sum er har frammanundan. Ein lítil ússaligur bátahylur verður eftir, ljósviðurskiftini broytast fyri alt økið, og tá ið Norrøna liggur við kei, verður ikki nógv eftir av tí lovprísaðu " gomlu Havnini".

Um – og eg endurtaki, um vit í heila tikið skuldu bygt nakað á Kongabrúnni, átti hetta at verið ein lættur lítil bygningur, sum at kalla "sveimaði" vektleysur yvir vágni.

Minnist meg rætt, teknaði Palli Gregoriussen eina ferð eitt virðiligt, um enn traditionelt, uppskot um nýtt tinghús uttast í Vágsbotni – úti í Bakka. Her var gott pláss, sólargangurin av tí besta, tætt við miðbýin og eisini beint við Tinganes. Men ráðandi politikkararnir tá sóu ikki møguleikan og lótu í staðin hetta unika stað til privatfólk at byggja sethús á.

**Bilar**
Bilar eru vorðnir ein stórur trupulleiki hjá Tórshavnar býráð. Bilar krevja fleiri vegir, teir vilja hava hol gjøgnum berg og bláar skorar, teir drepa fólk og dálka luftina. Nú vilja teir eisini hava fyrstarætt í Tórshavnar býi.

Tí verður fagri bletturin Skálatrøð í dag einans nýttur til skrambul og akfør.

**Nýtt tinghús**
Á hesum ediliga staði kundi eitt nýtt tinghús verðið reist. Her er einki frammanundan, og eitt vakurt tinghús kundi her verðið eitt virðiligt portur til høvuðsstaðin. Saman við teimum verandi funktiónunum, pakkhúsum, bátahavn, smiðju, vertshúsi, matstovu, handlum og kanska nýggjum funktiónum við, kundi ein samanhangandi havnafrontur verðið skaptur – fullur av lívi og vakurleika.

**Parkeringsøki**
Um til ber at gera parkeringsøki undir jørð á Kongabrúnni, má tað bera upp aftur betri til at gera nógv fleiri parkeringsøki undir jørð á Skálatrøð.

# Millummáli
*undir Núgvuni*

her undir grótheimsins
grønglaruta hamarstjøli

foyktum av eysturættar
kurlandi hvítkarðum

við tinnu í vinstru hond
umframt royðuflís úr Steffansgjáar
bløðandi hjarta

við tí visnaðu hondini á Golla í høgru

aksli eg hugans mjúka
mitrils messuakul
leski eg mítt lembas-breyð
drepi eg athelas-urt í
kalik fyltan við
smalumáls fjar-sára ævinleika

og stilli fyri eitt ár aftrat
svøltin eftir

lands míns angandi kroppi
og ævinliga ólisnu
Durin-rún

*tann 6. juni 2007*

*Hanus Kamban*

# Sandoyar Meginskúli

EYÐUN MOHR
VIDERØ



Í fundarfrásøgn frá Sands Kommunustýri verður upplýst, at stýrið á fundi 21.05.2007 hevur samtykt at fara undir at gera nýggjan bygdarskúla á Sandi.

Málið um skúlaviðurskiftini í bygdini hava verið umrødd leingi. Verandi skúli er bygdur fyri gott stórthundrað árum síðan, men peningaorka og politisk raðfesting hava havt við sær, at einki er hent enn.

Sjálvt um skúlin er bygdur fyrst í 1880-unum, so eru sjálvsagt gjørdar fleiri broytingar og ábøtur, men hóast hetta, so eru umstøðurnar hjá børnum og lærarum ikki nøktandi.

Í 1990-unum var kommunan illa stillað fíggjarliga sæð, men hetta batnaði seinni, og umstøður gjørdust fyri lánsafturgjalding og møguligum nýíløgum.

Núverandi stýrisformaður við meiriluta á Sandi tók við eftir valið í 2000, og á kunnandi fundi við lærarnar í kommunuskúlanum segði hann frá, at skúlaviðurskiftini fyribils vóru útsett til eftir íløgur til eina ítróttarhøll í oynni-við meginskúlan. Hetta varð tikið til eftirtektar.

Nú er samtykt at byggja nýggjan skúla, tó uttan nakra ítróttarhøll! Hvat nú?

Veruleikin er kortini tann, at vit eiga at skifta hugburð og hugsa meiri um samlaðu skúlaviðurskiftini og venda eygunum ímóti felagsskúlanum, um vit skulu fáa nøktandi viðurskifti bæði innan skúla og ítrótt!

Sambært hagtølum so lækkar barnatalið í oynni, so við at spjaða avmarkaðu fíggjarorkuna til fleiri smá einstøk skúlaøki, so var skilabetri at nýtt orkuna til at gjørt neyðugu útbyggingar og ábøtur á Sandoyar Meginskúla, og at savnað undirvísingina har. Fíggjarorkan varð tá nýtt meiri skilagott til ein skúla við einum setti av góðum og tíðarhóskandi undirvísingartilfari, í mun til vánaligt tilfar allastaðni! Fyri ikki at tala um betri nýtslu av orku og evnum hjá lærarunum!

Soleiðis varð fíggjarorkan nýtt best hóskandi fyri samlaða økið, fram um at nýta orkuna til spjaðing til frama fyri løtuvinning hjá lokalum politikarum, men til skaða fyri heildina!

Vit hava eitt sera væl útbygt samferðslukervi í oynni, so fluttningurin er ongin trupulleiki, og frástøðan millum bygdirnar í oynni er so lítil.

So mín áheitan á kommunustýrislimir í Sandoynni er, at framtíðaríløgur í skúlaverkið verður savnað í felagsskúlanum.

Vit seta stórar vónir til møguleikarnar, tá ein undirsjóartunnil kemur millum Sandoynna og Streymoynna, men skal nøkur menning gerast, so mugu vit hava skúlaverkið í lagi, og við Meginskúlan kemur hetta eisini at geva møguleikar fyri tí hart tiltrongdu ítróttarhøllini!